# Stuðulskonsert í Leirvíkar kirkju

**Sunnudagin verður konsert í Leirvíkar kirkju. Fleiri luttakarar verða við og stuðulin, ið latin verður, fer til gøtubørn í Ukraine**

KONSERTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú Leirvíkar kirkja aftur er tikin í brúk, hava fleiri konsertir verið á skránni.

Seinasta sunnudag var konsert við Felagskórinum Gøta-Leirvík, og seinasta hóskvøld var konsert við Trífljóð og Leirvíkar Gentukóri.

Komandi sunnudag verður aftur konsert í Leirvíkar kirkju, og hendan dagin verða fleiri ymiskir luttakarar við.

Trífljóð er heiti á floytutrio við Jonnu Sjúrðarberg, Anju Andreasen og Olgu Eysturstein. Tær tríggjar hava traðkað sínar barnaskógvar í musikkskúlaskipanini. Jonna og Olga vóru nevniliga millum fyrstu næmingarnar í Leirvík og Anja á sama hátt í Vágunum.


*Sunnudagin verður stuðulskonsert í Leirvíkar kirkju*

Hóskvøldið spældu Jonna, Anja og Olga nakrar jólasangir, og tær framførdu eisini Sjey Schumann stykki. Sum navnið sigur, eru hetta sjey stykki eftir kenda tónaskaldið, Robert Schumann. Hesi eru løgd til rættis fyri floytutrio.

Hetta er fimta árið á rað, at Leirvíkar Gentukór er við á jólakonsert. Leiðari er Dánjal Eysturstein. Tær syngja jólasangir, og úr Messe Basse eftir Gabriel Fauré syngja tær Agnus Deus. Tað er Heðin Kambsdal, sum hevur urgufylgispæl, og Bárður á Lakjuni spælir bass.

Sum nevnt, verða fleiri ymiskir luttakarar við á konsertini sunnudagin, ið er til frama fyri gøtubørn í Ukraine.

## Maður ákoyrdur í Saltangará

**Hósmorgun um átta tíðina kom ein 59 ára gamal maður fyri ein bil á økinum beint niðanfyri býráðsskrivstovuna í Saltangará**

VANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var myrkt, og vanliga er nógv ferðsla á hesum vegastrekki um morgnarnar.

Hendingin fór fram, tá ið ein 59 ára gamal maður, sum var á veg tvørtur um vegin, kom fyri ein bil, sum kom koyrandi inneftir.

Í bilinum var ein kvinna, sum júst hevði sett børnini av í skúlanum og var á veg til hús aftur.

Kvinnan segði, at hon sá ikki mannin, fyrr enn tað stoytti.

Sjúkrabilurin var rættiliga skjótur á staðið, og áðrenn løgreglan kom, var maðurin, sum kom fyri bilin, longu á veg á Landssjúkrahúsið.

Alt gekk rættiliga skjótt fyri seg, og læknin náddi heldur ikki at koma á staðið, áðrenn sjúkrabilurin var á veg til Havnar.

Sum skilst, skuldi sjúkrabilurin møta læknanum á vegum suðureftir.

Ákoyrdi maðurin hevði einki vit, tá ið hann fór uppí sjúkrabilin.

Hvussu støðan hjá manninum annars er, var ikki greitt, tá ið blaðið fór til prenttilgerðar, men alt bendir á, at hann hevur fingið ymiskar snuddir.

Á Politistøðini í Runavík visti Schandorff Vang einki at siga um tilburðin, tí hann var ikki á vakt, tá ið vanlukkan hendi. Maðurin, sum var á vakt, kom ikki aftur til arbeiðis fyrr enn kl. 17.

## Jólamenn vitja børnini í Eysturoy

**Í morgin fara jólamenn at vitja í øllum kommunum í Eysturoy**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrr komu jólamenninir – teir flestu gamlir og gráir - oman úr fjøllunum við posa á baki, tá ið tað stundaði til jóla. Í hellum uppi millum fjalla búleikast teir, tá ið jólini eru farin aftur um – og teir síggjast sjáldan, fyrr enn aftur líður móti jólum. Aftur í ár hava teir pakka jólapakkar til børn í Eysturoy.


*Í morgin, leygardagin, fara jólamenn at koyra runt í allari Eysturoynni við tveimum jólabilum – og øll børn, sum minnast til klokkuna og møta upp á staðnum, fáa jólapakkar frá jólamonnunum*

Í hesum nýggju tíðum, nú vegirnir eru góðir, og koyrandi er til allar bygdir í Eysturoy, verða sleturnar ikki so nógv brúktar longur. Tá ið kavi er, vitja jólamenninir kortini síni skyldfólk, sum búgva ymsastaðni millum fjalla – og tá er sletan góð at taka til, um ov langt er at ganga.

Men at fara runt í allari Eysturoynni á sletu, tá ið eingin kavi er, er ógjørligt. Tí eru jólamenninir – eins og øll onnur – farnir at koyra í bili. Tað er nógv skjótari, og tá kunnu eisini nógv fleiri børn, sum búgva í ymisku bygdunum í oynni, vænta sær jólapakkar.

### Um alla oynna

Leygardagin, 6. desember, fara jólamenninir soleiðis at vitja í hvørji kommunu í Eysturoy. Teir koma í reyðu og vøkru bilum sínum og øll børn, sum leggja sær klokkuna í geyma og eru á staðnum, tá ið jólamenninir koma, fáa jólapakka.

Aftur í ár hava jólamenninir heitt á Kunningarstovurnar í Eysturoy um at siga frá, nær teir kunnu væntast at verða á ymisku støðunum.

Jólabilarnir, sum fara at koyra um alla Eysturoynna í morgin, eru tveir í tali.

Jólabilur 1 steðgar á Strondum kl. 11, á Skála kl. 11.15, á Oyrabakka kl. 11.45, á Eiði kl. 12.15, við Gjógv kl. 13, í Funningi kl. 13.15, í Runavík kl. 14.30 og á Toftum kl. 15.30.

Jólabilur 2 steðgar í Funningsfirði kl. 12.00, í Oyndarfirði kl. 12.45, í Gøtu kl. 13.30, í Leirvík kl. 14.00 og í Fuglafirði kl. 14.30.

Jólamenninir siga, at øll børn, sum koma at vitja jólamenninar, fáa jólapakka.



# Nýggjur sáttmáli við ES hjálpir vinnuni

**Nýggi sáttmálin millum ES og Føroyar fer at geva vinnuni eitt breiðari rávørugrundarlag. Vinna fera at kunna keypa fisk í eitt nú Íslandi og Norra og útflyta hann tollfrían á ES-marknaðin**

NÝGGJUR SÁTTMÁLI
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Ein av høvuðsspurningunum hjá útflutningsvinnuni hevur verið, hvussu føroysk virki kunnu virka útlendska rávøru og útflyta hana á ES-marknaðin uttan toll.

Um eitt ár skuldu nógvar av teimum forðingum verið burtur.

Tá fer eitt nú Rækjuvirkið á Oyri at kunna keypa íslendskar og norskar rækjur, arbeiða tær í Føroyum, og útlfyta tær til ES uttan toll yvirhøvur. Í løtuni er støðan, at fullur tollur verður lagdur á til dømis rækjur úr Íslandi og Norra, sum vera arbeiddar í Føroyum.

Eisini á laksaøkinum verður ein munandi broyting. Føroyska alivinnan hevur ikki kunnað keypt norskan laks og roykt hann í Føroyum og útflutt hann aftur til ES uttan at goldið toll. Tað verður eisini broytt, so roykivirkið í Føroyum fara at hava størri marknað at keypa laks á.

Støðan broytist, tí Føroyar og Evropasamveldið eru vorðin samd um føroyskan limaskap í Alevropisku Skipanini fyri Samsavnan av Uppruna (Pan-European System of Cumulation of Origin).

### Upprunakravið hvørvur

Høvuðsinnihaldið er at nýggi sáttmálin broytir fatanina av, hvar vøran hevur sín uppruna. Umframt ES-londin, eru Ísland, Norra og fleiri eysturevropeisk lond við í sáttmálanum.

- Eg vænti at sum frálíður kemur Russland eisini við í sáttmálan og tá kunnu vit eisini keypa russiska fiskin, arbeiða hann og senda hann tollfrían á ES-marknaðin, sigur Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanlandsdeildini, sum hevur verið leiðari í samráðingarnevndini.

- Í fyrsta lagi verða broytingarnar kanska ikki so stórar, men sum frálíður fer vinnulívið í Føroyum at hava stórar fyrimunir. Vinnulívið fær eitt breiðari grundarlag at standa á.

Áðrenn nýggi sáttmálin fær gildi skal hann góðkennast í ES og í Føroyum. Í ES er góðkenningini óskiljandi long prosess, sum tekur minst eitt ár. Í Føroyum skal hann leggja fyri uttanlandsnevndina og er eingin viðmerking, so undirskriva løgmaður sáttmálan.


*Eftir nýggjari avtalu millum Føroyar og ES verður møguleiki at keypa norskan laks at roykja í Føroyum og senda hann á ES-marknaðin uttan at gjalda toll.*

### Torførar tingingar.

- Samráðingarnar hava frá fyrsta degi verið sera truplar, tí at ES hevur noktað Føroyum hetta ynski, verður sagt í tíðindaskrivi frá uttanlandsdeildini.

Føroyska samráðingarnevndin hevur á hvørjum ári havt drúgvar og torførar samráðingar við ES-samráðingarnevndina um hetta mál. Harumframt hava fleiri fundir verið á óformligum stigi millum føroysk embætisfólk og ávikavist embætisfólk hjá ES-nevndini og sendimenn hjá limalondunum í ES.

Føroyska sendistovan í ES hevur verið ein týðandi liður í hesum málið og hevur í dagliga samskiftinum við ES-myndugleikarnar virka fyri at fáa málið framt.

Grundgevingarnar móti føroyska ynskinum hava verið nógvar. Millum annað hevur verið víst á, at Føroyar hava ikki handilssáttmálar við øll limalondini í skipanini, at Føroyar hava ikki nóg tætt tilknýti til ES og at Føroyar hava ikki vilja slaka í svartkjaftasamráðingunum.

### Eitt triðja bein

Seinnu tíðina hevur ES serliga víst á trupulleikan, at Føroyar hava ein betri handilssáttmála við ES enn onnur lond í skipanini, og at Føroyar tí kunnu gerast einar víðopnar dyr fyri vørur úr hesum londum inn í ES.

Nú samráðingarnar eru loknar, eru Føroyar og ES vorðin samd um treytaleysan føroyskan limaskap í skipanini. Tað, ið nú fer at henda verður, at Føroyar og ES fara at fremja limaskapin saman við hinum londunum. Tað fer væntandi at taka um eitt ár.

- Skipaninfer at hava grundleggjandi broytingar við sær fyri føroyska vinnulívið. Til dømis fer nú at bera til at innflyta rávøru til Føroya úr eitt nú Íslandi og Noregi og viðgera hana í Føroyum og síðan útflyta hana tollfrítt á ES-marknaðin eftir handilssáttmálanum millum Føroyar og ES, verður undirstrika í einum tíðindaskrivi frá landsstýrinum.

- At føroyska vinnulívið nú fær møguleikan at grunda sína framleiðslu á eitt rávørugrundarlag, ið ikki einans eru føroyskar rávørur hevur við sær, at føroyski búskapurin nú fær eitt nýtt bein at standa á, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

## Vil lyfta Fornminnissavnið

Avgerðin hjá Fornminnissavninum at seta eina lyftu upp, so øll vitjandi nú lættliga kunnu vitja framsýningarnar á báðum hæddum, hevur frøtt Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum. Meginfelagið hevur avgjørt at geva Fornminnissavn-inum MBF viðurkenningina fyri hugburðin á Fornminnissavninum.

- MBF fegnast um tann hugburð sum Fornminnissavnið vísur og vónar at tað kann brúkast sum fyrimynd fyri onnur líkandi søvn, sigur Anna Suffía Durhuus, dagligur leiðari í MBF.

Í grundgevingini verður millum annað sagt:

- Fornminnissavnið er



eitt týðandi og áhugavert savn við framsýningum, ið avgjørt hava áhuga fyri flest allar føroyingar eisini føroyingar, ið bera brek. MBF metir, at atkoman heilt frá túninum og runt um inni á savninum, er gjørd sera góð. Gott pláss er til koyristólar, wc er sera gott og rúmligt. Frágreiðingar og annað, sum er um tingini, eru í góðari hædd og læettar at lesa, tá tú situr niðri.

- Nú er so lyfta sett upp, ið sambindur hæddirnar, so fólk við breki kunnu koma runt til alla framsýningina eins og fólk, ið ikki bera brek. Savnið hevur av síni játtan raðfest eina lyft, sum vit vilja geva teimum eitt herðaklapp fyri.

Trý onnur uppskot vóru til at fáa herðaklappið.